# ALMANNA- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ

Tórshavnar Kommuna
Postboks 32
110 Tórshavn

**Tórshavn, tann** 24. mai 2006

**J.Nr.:** 0.52-2301378/6
(at tilskila í svari)

**Viðgjørt:** RT/KÁ

**Viðvíkjandi umsókn um studningslán til ellisheim í Kirkjubø**

Kirkjubøar Kommuna søkti í 2004 um studningslán í sambandi við eina verkætlan um bygging av ellisheimi í Kirkjubø til 10 búfólk. Kirkjubøar kommuna varð løgd saman við Tórshavnar Kommunu tann 1. januar 2005, og tað er sostatt Tórshavnar Kommuna ið varðar av umsóknini. Tí verður hetta skriv sent til Tórshavnar Kommunu.

Almanna- og heilsumálaráðið hevur tann 17. januar 2006 kunnað Tórshavnar Kommuna um, at umsóknin ikki lýkur treytirnar í lóggávuni um studningslán, ið m.a. ásetir, at eitt ellis- og røktarheim í minsta lagi skal hava 20 búpláss. Samstundis varð kommunan spurd um, hvørt umsóknin framvegis var relevant, men Almanna- og heilsumálaráðið fekk onki svar frá Tórshavnar Kommunu til henda fyrispurningin.

Landsstýrismaðurin skal hervið boða Tórshavnar Kommunu frá, at umsóknin um studningslán til bygging av ellisheimi í Kirkjubø ikki lýkur treytirnar í § 4 í lógini um studningslán. Sostatt er ongin heimild at ganga umsóknini á møti, og hon verður við hesum avvíst.

Av tí, at umsóknin ikki er gingin á møti, verður kommununi, vísandi til § 18 í fyrisitingarlógini, givin møguleiki at gera viðmerkingar til avgerð Almanna- og heilsumálaráðsins.

Biðið verður um, at møguligar viðmerkingar eru Almanna- og heilsumálaráðnum í hendi í seinasta lagi 12. juni 2006.

Vinarliga

**Hans Pauli Strøm**
landsstýrismaður

/ Maria á Dul
virkandi aðalstjóri

# ALMANNA- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ

Fugloyar Kommuna
v/ Zakarias Zakariasen
767 Hattarvík

**Tórshavn, tann** 24. mai 2006

**J.Nr.:** 0.35-200600078/2
(at tilskila í svari)

**Viðgjørt:** RT/KÁ

**Viðvíkjandi umsókn um studningslán til bygging av røktarheimi**

Fugloyar Kommuna hevur søkt um studningslán í sambandi við eina ætlan um at byggja eitt eldrasambýli til 10 búfólk. Sambýlið er ein partur av eini størri verkætlan um ein sonevndan oyggjadepil, ið ætlandi skal samskipa eldrarøkt, barnaansing, ferðavinnu og skeiðsvirksemi. Eingin tekning fyriliggur, og í umsóknini verður onki sagt um, hvussu ætlanin er at fíggja verkætlanina. Harumframt ber umsóknin brá av óvissu, hvat fíggingini av kommunupartinum í íløguni viðvíkur.

Á hesum grundarlagi heldur landsstýrismaðurin tað ikki vera ráðiligt at fara inn í eina slíka ætlan og tí hevur hann avgjørt, ikki at ganga umsóknini hjá Fugloyar Kommunu á møti.

Av tí, at umsóknin ikki er gingin á møti, verður kommununi, vísandi til § 18 í fyrisitingarlógini, givin møguleiki at gera viðmerkingar til avgerð Almanna- og heilsumálaráðsins.

Biðið verður um, at møguligar viðmerkingar eru Almanna- og heilsumálaráðnum í hendi í seinasta lagi 12. juni 2006.

Vinarliga

**Hans Pauli Strøm**
landsstýrismaður

Maria á Dul
Maria á Dul
virkandi aðalstjóri

ALMANNA- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ

Tórshavnar Kommuna
Postboks 32
110 Tórshavn

**Tórshavn, tann** 24. mai 2006

**J.Nr.:** 0.52-2005000537/18
**(at tilskila í svari)**

**Viðgjørt:** RT/KÁ

**Viðvíkjandi umsókn um studningslán til eldrasambýli**

Tórshavnar Kommuna hevur søkt um stuðul til skipan av eldrasambýli til 10 búfólk, í sethúsaognini oman Mattalág 5 í Tórshavn. Sethúsaognin, ið ætlanin er at umbyggja, hevur skráveggir á loftshæddini, har búpláss ætlandi skulu vera. Harumframt vísir hjálagda tilfarið frá Tórshavnar Kommunu viðvíkjandi verkætlanini, at neyðugt hevur verið at gera frávik frá kommunalu byggisamtyktini viðvíkjandi rúmhæddini í niðastu hædd í sethúsaognini, um henda skal nýtast til eldrabúpláss.

Til tess at tryggja, at húsini eru egnað til eldrabúpláss, hevur Almanna- og heilsumálaráðið havt umsóknina til ummælis hjá Heimarøktini. Í ummælisskrivinum sæst, at Heimarøktin ikki kann viðmæla, at húsini kunnu nýtast sum eldrabúpláss, eftir tær ætlaðu umbyggingarnar. Tó verður sagt, at hølini kundu verið egnað sum bráfeingis umlættingarheim til borgarar, sum annars megna at vera í egnum heimi, við tænastu frá Heimarøktini. Men løgtingslógin um studningslán heimiðlar ikki veiting av stuðli til skipan av umlættingarheimum.

Landsstýrismaðurin skal hervið boða Tórshavnar Kommunu frá, at hann hevur avgjørt at sýta umsóknini um studningslán til skipan av eldrasambýli í sethúsaognini oman Mattalág 5 í Tórshavn. Hinvegin mælir landsstýrismaðurin Tórshavnar Kommunu til at taka upp samband við Heimarøktina, við tí endamáli at finna fram til á hvønn hátt ognin kann skipast sum bráðfeingis umlættingarheim, ið verður umsitið av Heimarøktini.

Av tí, at umsóknin ikki er gingin á møti, verður kommununi, vísandi til § 18 í fyrisitingarlógini, givin møguleiki at gera viðmerkingar til avgerð Almanna- og heilsumálaráðsins.

Biðið verður um, at møguligar viðmerkingar eru Almanna- og heilsumálaráðnum í hendi í seinasta lagi 12. juni 2006.

Vinarliga

Hans Pauli Strøm
landsstýrismaður

/ Maria á Dul
virkandi aðalstjóri

EIRARGARÐUR 2 • 100 TÓRSHAVN
TELEFON 30 40 40 • TELEFAX 35 40 46 • E-MAIL: AHR@AHR.FO

# ALMANNA- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ

Stýrið fyri Ellis- og avlamisheimið í Vágum
370 Miðvágur

**Tórshavn, tann** 24. mai 2006

**J.Nr.:** 0.52-200400333/10
(at tilskila í svari)

**Viðgjørt:** RT/KÁ

**Viðvíkjandi umsókn um studningslán til útbygging av ellis- og avlamisheiminum í Vágum**

Stýrið fyri ellis- og avlamisheimið í Vágum hevur søkt um studningslán til eina útbygging av heiminum, og til umbygging av køkinum. Við umsóknini fylgdi ein váttan frá øllum kommununum í Vágum og Mykinesi um, at tær stuðlaði verkætlanini hjá sjálvsognarstovninum.

Orsakað av, at kommunuval hevur verið síðan umsóknin varð send, varð stýrið í mars 2006 spurgt um ætlanin framvegis var aktuell. Somuleiðis hevur Almanna- og heilsumálaráðið vent sær til allar kommunurnar í oynni við einum fyrispurningi um, hvørt tær framvegis eru við í ætlanini. Kommunurnar í Vágunum hava í mars 2006 kunnað Almanna- og heilsumálaráðið um, at tær ikki longur eru samdar um eina felags útbygging á eldraøkinum í Vágum. Miðvágs og Sandavágs Kommunur stuðla framvegis verkætlanini hjá stýrinum fyri ellis- og avlamisheimið í Vágum. Harímóti tekur Sørvágs Kommuna ikki longur undir við ætlanini.

Landsstýrismaðurin hevur tikið til eftirtektar, at kommunurnar í Vágum ikki longur eru samdar um eina felags útbygging av eldraøkinum í Vágum. Sostatt er haldgott grundarlag ikki longur fyri verkætlanini, og landsstýrismaðurin hevur á hesum grundarlagi avgjørt ikki at ganga umsóknini á møti.

Av tí, at umsóknin ikki er gingin á møti, verður sjálvsognarstovninum, vísandi til § 18 í fyrisitingarlógini, givin møguleiki at gera viðmerkingar til avgerð Almanna- og heilsumálaráðsins.

Biðið verður um, at møguligar viðmerkingar eru Almanna- og heilsumálaráðnum í hendi í seinasta lagi 12. juni 2006.

Vinarliga

Hans Pauli Strøm
**Hans Pauli Strøm**
landsstýrismaður

/ Maria á Dul
Maria á Dul
virkandi aðalstjóri

EIRARGARÐUR 2 • 100 TÓRSHAVN
TELEFON 30 40 40 • TELEFAX 35 40 46 • E-MAIL: AHR@AHR.FO

ALMANNA- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ

Sjóvar Kommuna
490 Strendur

Tórshavn, tann 24. mai 2006

J.Nr.: 0.35-200500152/11
(at tilskila í svari)

Viðgjørt: RT/KÁ

**Viðvíkjandi umsókn um studningslán til bygging av eldrasambýli**

Sjóvar kommuna hevur søkt um studningslán í sambandi við eina verkætlan um at byggja eitt eldrasambýli á Strondum til 12 búfólk.

Vísandi til § 2 í løgtingslóg nr. 166, frá 22. desember 2005 um studningslán til ellis- og røktarheim og eldrasambýli, skulu umsóknirnar um studningslán viðgerast við grundarlagi í tørvinum á eldrabúplássum, innan ta landafrøðiligu eindina, sum kommunan liggur í. Sambært nýggjastu kanningini hjá Almanna- og heilsumálaráðnum av tørvinum á eldrabúplássum, og eini aktuellari meting hjá heimarøktini, er tørvurin á eldrabúplássum í heimarøktarøki 3 (Eysturoy) nøktaður. Sostatt er tørvsgrundarlag ikki fyri verkætlanini hjá Sjóvar Kommunu.

Á hesum grundarlagi skal landsstýrismaðurin siga frá, at hann hevur avgjørt ikki at ganga umsóknini hjá Sjóvar Kommunu á møti.

Av tí, at umsóknin ikki er gingin á møti, verður kommununi, vísandi til § 18 í fyrisitingarlógini, givin møguleiki at gera viðmerkingar til avgerð Almanna- og heilsumálaráðsins.

Biðið verður um, at møguligar viðmerkingar eru Almanna- og heilsumálaráðnum í hendi í seinasta lagi 12. juni 2006.

Vinarliga

**Hans Pauli Strøm**
landsstýrismaður

/ Maria á Dul
virkandi aðalstjóri

EIRARGARÐUR 2 • 100 TÓRSHAVN
TELEFON 30 40 40 • TELEFAX 35 40 46 • E-MAIL: AHR@AHR.FO

Fuglafjarðar Kommuna
Postboks 30
535 Fuglafjørður

**Tórshavn, tann** 24. mai 2006

**J.Nr.:** 0.52-2201442/14
**(at tilskila í svari)**

**Viðgjørt:** RT/KÁ

**Viðvíkjandi umsókn um studningslán til bygging av røktarheimi**

Fuglafjarðar Kommuna hevur søkt um studningslán í sambandi við eina verkætlan um bygging av einum røktarheimi til 20 búfólk.

Vísandi til § 2 í løgtingslóg nr. 166, frá 22. desember 2005 um studningslán til ellis- og røktarheim og eldrasambýli, skulu umsóknirnar um studningslán viðgerast við grundarlagi í tørvinum á eldrabúplássum, innan ta landafrøðiligu eindina, sum kommunan liggur í. Sambært nýggjastu kanningini hjá Almanna- og heilsumálaráðnum av tørvinum á eldrabúplássum, og eini aktuellari meting hjá heimarøktini, er tørvurin á eldrabúplássum í heimarøktarøki 3 (Eysturoy) nøktaður. Sostatt er tørvsgrundarlag ikki fyri verkætlanini hjá Fuglafjarðar Kommunu.

Á hesum grundarlagi skal landsstýrismaðurin siga frá, at hann hevur avgjørt ikki at ganga umsóknini hjá Fuglafjarðar Kommunu á møti.

Av tí, at umsóknin ikki er gingin á møti, verður kommununi, vísandi til § 18 í fyrisitingarlógini, givin møguleiki at gera viðmerkingar til avgerð Almanna- og heilsumálaráðsins.

Biðið verður um, at møguligar viðmerkingar eru Almanna- og heilsumálaráðnum í hendi í seinasta lagi 12. juni 2006.

Vinarliga

Hans Pauli Strøm
**Hans Pauli Strøm**
landsstýrismaður

/ Maria á Dul
Maria á Dul
virkandi aðalstjóri

EIRARGARÐUR 2 • 100 TÓRSHAVN
TELEFON 30 40 40 • TELEFAX 35 40 46 • E-MAIL: AHR@AHR.FO

ALMANNA- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ

Runavíkar Kommuna
Postboks 139
610 Saltangará

**Tórshavn, tann** 24. mai 2006

**J.Nr.:** 0.35-200600171/6
(at tilskila í svari)

**Viðgjørt:** RT/KÁ

**Viðvíkjandi umsókn um studningslán til útbygging av eldrasambýlinum á Skála**

Skála Kommuna (nú Runavíkar Kommuna) hevur søkt um studningslán í sambandi við eina verkætlan um útbygging av eldrasambýlinum á Skála við 7 búplássum.

Vísandi til § 2 í løgtingslóg nr. 166, frá 22. desember 2005 um studningslán til ellis- og røktarheim og eldrasambýli, skulu umsóknirnar um studningslán viðgerast við grundarlagi í tørvinum á eldrabúplássum, innan ta landafrøðiligu eindina, sum kommunan liggur í. Sambært nýggjastu kanningini hjá Almanna- og heilsumálaráðnum av tørvinum á eldrabúplássum, og eini aktuellari meting hjá heimarøktini, er tørvurin á eldrabúplássum í heimarøktarøki 3 (Eysturoy) nøktaður. Sostatt er tørvsgrundarlag ikki fyri verkætlanini hjá Runavíkar Kommunu.

Á hesum grundarlagi skal landsstýrismaðurin siga frá, at hann hevur avgjørt ikki at ganga umsóknini hjá Runavíkar Kommunu á møti.

Av tí, at umsóknin ikki er gingin á møti, verður kommununi, vísandi til § 18 í fyrisitingarlógini, givin møguleiki at gera viðmerkingar til avgerð Almanna- og heilsumálaráðsins.

Biðið verður um, at møguligar viðmerkingar eru Almanna- og heilsumálaráðnum í hendi í seinasta lagi 12. juni 2006.

Vinarliga

**Hans Pauli Strøm**
landsstýrismaður

Maria á Dul
virkandi aðalstjóri

# ALMANNA- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ

Hugin Skaalum
Mýratrøðni 17
380 Sørvágur

**Tórshavn, tann** 24. mai 2006

**J.Nr.:** 0.35-200600133/3
(at tilskila í svari)

**Viðgjørt:** RT/KÁ

**Viðvíkjandi umsókn um studningslán til bygging av eldrasambýli í Sørvági**

Í skrivi dagfest 28. januar 2006, hava tygum søkt um loyvi at byggja & stovnseta eitt eldrasambýli í Sørvági. Av umsóknini sæst, at talan er um eina umsókn um studningslán til eldrasambýli.

Vísandi til § 1 í løgtingslóg nr. 166, frá 22. desember 2005 um studningslán til ellis- og røktarheim og eldrasambýli, kann studningslán verða latið kommunum til keyp, nýbygging ella umbygging av ognum, sum skulu nýtast til ellis- og røktarheim ella til eldrasambýli. Somuleiðis kann studningslán eisini veitast sjálvsognarstovnum, ið eiga ellis- og røktarheim ella eldrasambýli. Sostatt er eingin lógarheimild at veita studningslán til ætlan tygara.

Landsstýrismaðurin skal hervið boða frá, at umsókn tygara ikki lýkur lógarásettu treytirnar fyri, at umsóknin kann viðgerðast. Á hesum grundarlagi, verður umsókn tygara avvíst.

Av tí, at umsóknin ikki er gingin á møti, verða tygum, vísandi til § 18 í fyrisitingarlógini, givin møguleiki at gera viðmerkingar til avgerð Almanna- og heilsumálaráðsins.

Biðið verður um, at møguligar viðmerkingar eru Almanna- og heilsumálaráðnum í hendi í seinasta lagi 12. juni 2006.

Vinarliga

Hans Pauli Strøm
**Hans Pauli Strøm**
landsstýrismaður

/ Maria á Dul
Maria á Dul
virkandi aðalstjóri

ALMANNA- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ

Tórshavnar Kommuna
Postboks 32
110 Tórshavn

**Tórshavn, tann** 24. mai 2006

**J.Nr.:** 0.52-200600068/3
(at tilskila í svari)

**Viðgjørt:** RT/KÁ

**Viðvíkjandi umsókn um studningslán til eldrasambýli í Nólsoy**

Tórshavnar Kommuna hevur søkt um studningslán til eina verkætlan um bygging av eldrasambýli til 10 búfólk í Nólsoy. Ongin kostnaðarmeting er gjørd og ongar skitsutekningar eru til taks. Tann 7. mars hevur Almanna- og heilsumálaráðið biðið kommuna um at útvega Almanna- og heilsumálaráðnum tekning og kostnaðarmeting av ætlanini, men kommunan hevur ikki svarað umbønini.

Landsstýrismaðurin tekur til eftirtektar, at onki ítøkiligt tilfar er til taks um verkætlanina. Somuleiðis tekur landsstýrismaðurin til eftirtektar, at Tórshavnar Kommuna hevur ikki útvegað Almanna- og heilsumálaráðnum tað tilfar, ið biðið er um. Landsstýrismaðurin skal hervið kunna Tórshavnar Kommunu um, at umsóknin av omanfyristandandi orsøkum ikki kann gangast á møti.

Av tí, at umsóknin ikki er gingin á møti, verður kommununi, vísandi til § 18 í fyrisitingarlógini, givin møguleiki at gera viðmerkingar til avgerð Almanna- og heilsumálaráðsins.

Biðið verður um, at møguligar viðmerkingar eru Almanna- og heilsumálaráðnum í hendi í seinasta lagi 12. juni 2006.

Vinarliga

Hans Pauli Strøm
**Hans Pauli Strøm**
landsstýrismaður

/ Maria á Dul
Maria á Dul
virkandi aðalstjóri

# ALMANNA- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ

Stýrið fyri Norðoya Ellis- og Vistarheim
Garðavegur 10
700 Klaksvík

**Tórshavn, tann** 24. mai 2006

**J.Nr.:** 0.52-200600151/4
(at tilskila í svari)

**Viðgjørt:** RT/KÁ

**Viðvíkjandi umsókn um studningslán til útbygging av Norðoya Ellis- og Vistarheimi**

Stýrið fyri Norðoya Ellis- og Vistarheim hevur søkt um studningslán til eina verkætlan um útbygging av heiminum við 6 búplássum. Stýrið upplýsir eisini, at tey hava søkt kommunurnar í Norðoyggjum um stuðul til verkætlanina, eins og ætlanin er at upptaka lán.

Sambært tilfarinum frá stýrinum fyri Norðoya Ellis- og Vistarheim er greitt, at ongin tilsøgn fyriliggur frá kommununum í Norðoyggjum, um at luttaka í ætlanini. Harumframt ásetur § 42 í stýrisskipanarlógini, at stovnar undir landinum ikki kunnu upptaka lán, uttan at heimild er fyri hesum í løgtingslóg. Orsakað av, at sjálvsognarstovnar, ið reka eldrabúpláss, eru 100% fíggjaðir av landinum, verða hesir eisini roknaðir sum stovnar undir landinum. Tí hevur Norðoya Vistarheim ikki heimild til at upptaka lán til at fíggja partar av verkætlanini. Sostatt er fíggjarliga grundarlagið undir verkætlanini ógreitt.

Landsstýrismaðurin er av tí fatan, at umsóknin hjá sjálvsognarstovninum er ikki búgvin til støðutakan, tí alt ov nógvar óvissur eru viðvíkjandi tí fíggjarliga partinum. Út frá tí tilfari, sum er til taks í málinum, heldur landsstýrismaðurin sostatt ikki, at grundarlag er fyri at arbeiða víðari við málinum, og umsóknin verður tí ikki gingin á møti.

Av tí, at umsóknin ikki er gingin á møti, verður sjálvsognarstovninum, vísandi til § 18 í fyrisitingarlógini, givin møguleiki at gera viðmerkingar til avgerð Almanna- og heilsumálaráðsins.

Biðið verður um, at møguligar viðmerkingar eru Almanna- og heilsumálaráðnum í hendi í seinasta lagi 12. juni 2006.

Vinarliga

Hans Pauli Strøm
landsstýrismaður

/ Maria á Dul
virkandi aðalstjóri

EIRARGARÐUR 2 • 100 TÓRSHAVN
TELEFON 30 40 40 • TELEFAX 35 40 46 • E-MAIL: AHR@AHR.FO

ALMANNA- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ

Gøtu Kommuna
Postboks 40
515 Gøta

**Tórshavn, tann** 24. mai 2006

**J.Nr.:** 0.35-2101306/21
(at tilskila í svari)

**Viðgjørt:** RT/KÁ

**Viðvíkjandi umsókn um studningslán til víðkan av Gøtubrá**

Gøtu Kommuna hevur søkt um studningslán á kr. 300.000, til víðkan av eldrasambýlinum Gøtubrá, úr 10 upp í 16 búpláss. Kommunan hevur síðani upplýst, at Eysturoyar ellis- og røktarheim er áhugað í at leiga tey 6 nýggju búrúmini í kjallarahæddini á Eldrasambýlinum Gøtubrá í fyribils 2 ár.

Hervið verður sagt frá, at landsstýrismaðurin hevur avgjørt at geva Gøtu Kommunu endaliga tilsøgn um studningslán á kr. 300.000, til víðkan av eldrasambýlinum Gøtubrá, úr 10 upp í 16 búpláss. Tilsøgnin er treytað av, at:

1. Allar leiguinntøkur av teim 6 búplássunum skulu innganga í raksturin av Eldrasambýlinum Gøtubrá.
2. At Gøtu Kommuna í góðari tíð frammanundan kunnar Almanna- og heilsumálaráðið um, hvørt leigumálið um tey 6 búplássini heldur fram útyvir tey ætlaðu 2 árini.

Harumframt verður víst til treytirnar, sum eru ásettar eru í § 3, § 4, stk. 1 og § 6, stk. 1 og 2 í løgtingslóg nr. 166, frá 22. desember 2005 um studningslán til ellis- og røktarheim. Studningslánið verður útgoldið, eftir at eitt pantibræv áljóðandi studningslánið, er tinglisið á ognina.

Vinarliga

**Hans Pauli Strøm**
landsstýrismaður

/ Maria á Dul
virkandi aðalstjóri

EIRARGARÐUR 2 • 100 TÓRSHAVN
TELEFON 30 40 40 • TELEFAX 35 40 46 • E-MAIL: AHR@AHR.FO

Tórshavnar Kommuna
Postboks 32
110 Tórshavn

**Tórshavn, tann** 24. mai 2006

**J.Nr.:** 0.52-200500536/7
(at tilskila í svari)

**Viðgjørt:** RT/KÁ

**Viðvíkjandi umsókn um studningslán til bygging av røktarheimi undir Boðaneshamri**

Tórshavnar Kommuna hevur søkt um studningslán til eina størri kombineraða verkætlan undir Boðaneshamri, Yviri við Strond. Ætlanin fevnir um ein røktarheimspart við 24 búplássum, eitt ávíst tal av vardum eldraíbúðum og eitt sonevnt dagsentur.

Hervið verður sagt frá, at landsstýrismaðurin hevur avgjørt at geva Tórshavnar Kommunu tilsøgn um studningslán til røktarheimspartin av verkætlanini á í mesta lagi 12 mió. kr. Tann endaliga játtanin av studningsláninum er treytað av, at niðanfyristandandi 5. treytir verða uppfyltar:

1. Verkætlanin er í tráð við kommunalu byggisamtyktina.
2. At Tórshavnar Kommuna í seinasta lagi 1. oktober 2006 hevur gjørt eina ítøkiliga tíðarætlan fyri samlaðu verkætlanina.
3. At Tórshavnar Kommuna í seinasta lagi 1. oktober 2006 hevur gjørt eina fyribils útgreinaða kostnaðarmeting av røktarheimspartinum í verkætlanini.
4. At raksturin av røktarheimspartinum í verkætlanini á ongan hátt verður tvinnaður saman við raksturin av vardu íbúðunum, sum eisini eru partar av verkætlanini.
5. At í minsta lagi eitt umboð fyri Heimarøktina verður valt í bygginevndina.

Harumframt verður víst til treytirnar, sum eru ásettar eru í § 3, § 4, stk. 1 og § 6, stk. 1 og 2 í løgtingslóg nr. 166, frá 22. desember 2005 um studningslán til ellis- og røktarheim. Her verður m.a. ásett, at:

1) byggiætlan skal vera góðkend av landsstýrismanninum, áðrenn farið verður undir at byggja,
2) studningslánið verður tryggjað við veðrætti innan fyri 90% av metingarvirðinum,
3) viðtøkur eru fyri heimið, sum eru góðkendar av landsstýrismanninum, og sum einans kunnu broytast við samtykki hansara og
4) studningslánið fellur til gjaldingar, um so er, at ognin verður seld, ella ikki longur verður nýtt til ellis og røktarheim ella sambýli. Henda treyt skal tinglesast á ognini við servitutti.

Áðrenn studningslánið verður útgoldið, skal eitt pantibræv áljóðandi studningslánið, verða tinglisið á ognini.

EIRARGARÐUR 2 • 100 TÓRSHAVN
TELEFON 30 40 40 • TELEFAX 35 40 46 • E-MAIL: AHR@AHR.FO

Studningslánið verður útgoldið hvønn ársfjórðing, eftir at áteknað uppgerð yvir hildnar útreiðslur fyri ársfjórðingin frammanundan fyriliggur Almanna- og heilsumálaráðnum.

Tórshavnar kommuna verður í hesum sambandi biðin um at koma við uppskoti um útgjaldingarprofil fyri tíðarskeiðið, byggingin er mett at taka.

Eru serlig viðurskifti, ið gera seg galdandi, kann víkjast frá útgjaldingartíðarskeiðinum eftir nærri avtalu millum partarnar.

Grannskoðaður byggiroknskapur skal fyriliggja Almanna- og heilsumálamálaráðnum í seinasta lagi 6 mánaðir eftir, at byggingin er liðug.

Vinarliga

**Hans Pauli Strøm**
landsstýrismaður

/ Maria á Dul
Maria á Dul
virkandi aðalstjóri

# ALMANNA- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ

Tórshavnar Kommuna
Postboks 32
110 Tórshavn

**Tórshavn, tann** 24. mai 2006

**J.Nr.:** 0.52-2300850/9
(at tilskila í svari)

**Viðgjørt:** RT/KÁ

**Viðvíkjandi umsókn um studningslán til nýbygging av Tjarnargarði**

Tórshavnar Kommuna hevur søkt um studningslán til eina verkætlan um nýbygging av Tjarnargarði við 24 búplássum.

Hervið verður sagt frá, at landsstýrismaðurin hevur avgjørt at geva Tórshavnar Kommunu endaliga tilsøgn um studningslán til røktarheimspartin av verkætlanini á í mesta lagi 12 mió. kr. ið er treytað av, at:

1. Verkætlanin er í tráð við kommunalu byggisamtyktina.
2. Í minsta lagi eitt umboð fyri Heimarøktina verður valt í bygginevndina.

Harumframt verður víst til treytirnar, sum eru ásettar eru í § 3, § 4, stk. 1 og § 6, stk. 1 og 2 í løgtingslóg nr. 166, frá 22. desember 2005 um studningslán til ellis- og røktarheim. Her verður m.a. ásett, at:

1) byggiætlan skal vera góðkend av landsstýrismanninum, áðrenn farið verður undir at byggja,
2) studningslánið verður tryggjað við veðrætti innan fyri 90% av metingarvirðinum,
3) viðtøkur eru fyri heimið, sum eru góðkendar av landsstýrismanninum, og sum einans kunnu broytast við samtykki hansara og
4) studningslánið fellur til gjaldingar, um so er, at ognin verður seld, ella ikki longur verður nýtt til ellis og røktarheim ella sambýli. Henda treyt skal tinglesast á ognini við servitutti.

Áðrenn studningslánið verður útgoldið, skal eitt pantibræv áljóðandi studningslánið, verða tinglisið á ognini.

Studningslánið verður útgoldið hvønn ársfjórðing, eftir at áteknað uppgerð yvir hildnar útreiðslur fyri ársfjórðingin frammanundan fyriliggur Almanna- og heilsumálaráðnum.

Tórshavnar kommuna verður í hesum sambandi biðin um at koma við uppskoti um útgjaldingarprofil fyri tíðarskeiðið, byggingin er mett at taka.

EIRARGARÐUR 2 • 100 TÓRSHAVN
TELEFON 30 40 40 • TELEFAX 35 40 46 • E-MAIL: AHR@AHR.FO

Eru serlig viðurskifti, ið gera seg galdandi, kann víkjast frá útgjaldingartíðarskeiðinum eftir nærri avtalu millum partarnar.

Grannskoðaður byggiroknskapur skal fyriliggja Almanna- og heilsumálamálaráðnum í seinasta lagi 6 mánaðir eftir, at byggingin er liðug.

Vinarliga

Hans Pauli Strøm
**Hans Pauli Strøm**
landsstýrismaður

Maria á Dul
Maria á Dul
virkandi aðalstjóri

# ALMANNA- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ

Tórshavnar Kommuna
Postboks 32
110 Tórshavn

**Tórshavn, tann** 24. mai 2006
**J.Nr.:** 0.52 – 2200384/46
(at tilskila í svari)

**Viðgjørt:** KÁ

**Tygara skriv**

**Viðvíkjandi umsókn um hækkan av studningsláni til røktarheimið Tjarnargarður**

Víst verður til skriv Almanna- og heilsumálaráðsins dagfest 16. juli 2004, har kommununi varð boðað frá, at Almanna- og heilsumálaráðið vil taka málið um hækkan av studningsláninum upp til viðgerðar tá lógargrundarlagið er broytt.

Hervið verður sagt frá, at landsstýrismaðurin við heimild í §§1 og 4 í løgtingslóg um studningslán til ellis- og røktarheim hevur avgjørt at geva Tórshavnar kommunu tilsøgn um hækkan av studningsláninum á íalt kr. 280.000.

> § **1.** Studningslán úr landskassanum, sum er rentu og avdráttarfrítt, kann verða latið kommunum til keyp, nýbygging ella umbygging av ognum, sum skulu nýtast til ellis- og røktarheim ella til eldrasambýli.
>
> § **4.** Til ellis- og røktarheim verður veitt í mesta lagi 500.000 kr., faldað við talinum av búfólki, sum heimið er ætlað til, tó ongantíð meira enn helvtina av keypi- ella byggikostnaðinum.

Tilsøgnin er treytað av, at studningslánið er tryggjað við veðrætti innan fyri 90% av metingarvirðinum og eitt pantibræv áljóðandi studningslánið er tinglisið á ognina, áðrenn útgoldið verður.

Vinarliga

Hans Pauli Strøm

**Hans Pauli Strøm**
landsstýrismaður

Maria á Dul

Maria á Dul
virkandi aðalstjóri

EIRARGARÐUR 2 • 100 TÓRSHAVN
TELEFON 30 40 50 • TELEFAX 35 40 45 • E-MAIL: AHR@AHR.FO

ALMANNA- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ

Svínoyar Kommuna
765 Svínoy

Tórshavn, tann 24. mai 2006

J.Nr.: 0.35-2301478/7
(at tilskila í svari)

Viðgjørt: RT/KÁ

**Viðvíkjandi umsókn um studningslán til eldrasambýli**

Svínoyar Kommuna hevur søkt um studningslán í sambandi við eina verkætlan um bygging av einum eldrasambýli til 8 búfólk í Svínoy.

Herviðverður sagt frá, at landsstýrismaðurin hevur avgjørt at geva Svínoyar Kommunu tilsøgn um studningslán á kr. 400.000,-. Tann endaliga játtanin av studningsláninum er treytað av, at niðanfyristandandi treytir verða uppfyltar:

1. Verkætlanin er í tráð við kommunalu byggisamtyktina.
2. At Svínoyar Kommuna í seinasta lagi tann 1. oktober 2006 upplýsir fyri Almanna- og heilsumálaráðnum, hvussu kommunuparturin av íløguni í verkætlanina verður fíggjaður.
3. At Svínoyar Kommuna í seinasta lagi tann 1. oktober 2006 letur Almanna- og heilsumálaráðnum eina endurskoðaða útgreinaða kostnaðarmeting av verkætlanini.
4. Í minsta lagi eitt umboð fyri Heimarøktina verður valt í bygginevndina.

Harumframt verður víst til treytirnar, sum eru ásettar eru í § 3, § 4, stk. 1 og § 6, stk. 1 og 2 í løgtingslóg nr. 166, frá 22. desember 2005 um studningslán til ellis- og røktarheim. Her verður m.a. ásett, at:

1) byggiætlan skal vera góðkend av landsstýrismanninum, áðrenn farið verður undir at byggja,
2) studningslánið verður tryggjað við veðrætti innan fyri 90% av metingarvirðinum,
3) viðtøkur eru fyri heimið, sum eru góðkendar av landsstýrismanninum, og sum einans kunnu broytast við samtykki hansara og
4) studningslánið fellur til gjaldingar, um so er, at ognin verður seld, ella ikki longur verður nýtt til ellis og røktarheim ella sambýli. Henda treyt skal tinglesast á ognini við servitutti.

Studningslánið verður útgoldið, tá byggingin er liðug og verður útgoldið eftir, at eitt pantibræv er tinglisið á ognina við áljóðandi studningsláni

EIRARGARÐUR 2 • 100 TÓRSHAVN
TELEFON 30 40 40 • TELEFAX 35 40 46 • E-MAIL: AHR@AHR.FO

Grannskoðaður byggiroknskapur skal fyriliggja Almanna- og heilsumálamálaráðnum í seinasta lagi 6 mánaðir eftir, at byggingin er liðug.

Leggjast skal afturat, at tað í hesi tilsøgn um studningslán eisini liggur ein tilsøgn um, at landið veitir figging til rakstur av nýggja eldrasambýlinum, eftir somu treytum sum til onnur eldrasambýli. Kommununar partur av hesi útreiðslu, er raksturin av bygninginum og gjald fyri náttavaktina.

Vinarliga

**Hans Pauli Strøm**
landsstýrismaður

/ Maria á Dul
Maria á Dul/
virkandi aðalstjóri

# ALMANNA- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ

Kvívíkar Kommuna
340 Kvívík

**Tórshavn, tann** 24. mai 2006

**J.Nr.:** 0.52-200400270/9
**(at tilskila í svari)**

**Viðgjørt:** RT/KÁ

**Viðvíkjandi umsókn um studningslán til bygging av røktarheimi í Vestmanna**

Kvívíkar og Vestmanna kommunur hava søkt um studningslán til eina verkætlan um bygging av einum ellis- og røktarheimi í Vestmanna til 28 búfólk.

Hervið verður sagt frá, at landsstýrismaðurin hevur avgjørt at játta í mesta lagi 12. mió. kr. til endamálið, við hesum treytum:

1. At verkætlanin er í tráð við kommunalu byggisamtyktina.
2. At verkætlanin verður minkað úr 28 niður í 24 búfólk.
3. At í minsta lagi eitt umboð fyri Heimarøktina verður valt í bygginevndina.

Harumframt verður víst til treytirnar, sum eru ásettar eru í § 3, § 4, stk. 1 og § 6, stk. 1 og 2 í løgtingslóg nr. 166, frá 22. desember 2005 um studningslán til ellis- og røktarheim. Her verður m.a. ásett, at:

1) byggiætlan skal vera góðkend av landsstýrismanninum, áðrenn farið verður undir at byggja,
2) studningslánið verður tryggjað við veðrætti innan fyri 90% av metingarvirðinum,
3) viðtøkur eru fyri heimið, sum eru góðkendar av landsstýrismanninum, og sum einans kunnu broytast við samtykki hansara og
4) studningslánið fellur til gjaldingar, um so er, at ognin verður seld, ella ikki longur verður nýtt til ellis og røktarheim ella sambýli. Henda treyt skal tinglesast á ognini við servitutti.

Áðrenn studningslánið verður útgoldið, skal eitt pantibræv áljóðandi studningslánið, verða tinglisið á ognini.

Studningslánið verður útgoldið hvønn ársfjórðing, eftir at áteknað uppgerð yvir hildnar útreiðslur fyri ársfjórðingin frammanundan fyriliggur Almanna- og heilsumálaráðnum.

Kvívíkar og Vestmanna kommunur verða í hesum sambandi bidnar um at koma við uppskoti um útgjaldingarprofil fyri tíðarskeiðið, byggingin er mett at taka.

Eru serlig viðurskifti, ið gera seg galdandi, kann víkjast frá útgjaldingartíðarskeiðinum eftir nærri avtalu millum partarnar.

Grannskoðaður byggiroknskapur skal fyriliggja Almanna- og heilsumálamálaráðnum í seinasta lagi 6 mánaðir eftir, at byggingin er liðug.

Av tí at umsóknin um tal av búfólki ikki er gingin fult á møti, verður vísandi til § 18 í fyrisitingarlógini, givin kommununi møguleika at gera viðmerkingar til avgerð Almanna- og heilsumálaráðsins.

Biðið verður um at møguligar viðmerkingar eru Almanna- og heilsumálaráðnum í hendi í seinasta lagi 12. juni 2006.

Vinarliga

**Hans Pauli Strøm**
landsstýrismaður

Maria á Dul
virkandi aðalstjóri

Vestmanna Kommuna
Postboks 91
355 Vestmanna

**Tórshavn, tann** 24. mai 2006

**J.Nr.:** 0.52-200400270/9
(at tilskila í svari)

**Viðgjørt:** RT/KÁ

**Viðvíkjandi umsókn um studningslán til bygging av røktarheimi í Vestmanna**

Vestmanna og Kvívíkar kommunur hava søkt um studningslán til eina verkætlan um bygging av einum ellis- og røktarheimi í Vestmanna til 28 búfólk.

Hervið verður sagt frá, at landsstýrismaðurin hevur avgjørt at játta í mesta lagi 12. mió. kr. til endamálið, við hesum treytum:

1. At verkætlanin er í tráð við kommunalu byggisamtyktina.
2. At verkætlanin verður minkað úr 28 niður í 24 búfólk.
3. At í minsta lagi eitt umboð fyri Heimarøktina verður valt í bygginevndina.

Harumframt verður víst til treytirnar, sum eru ásettar eru í § 3, § 4, stk. 1 og § 6, stk. 1 og 2 í løgtingslóg nr. 166, frá 22. desember 2005 um studningslán til ellis- og røktarheim. Her verður m.a. ásett, at:

1) byggiætlan skal vera góðkend av landsstýrismanninum, áðrenn farið verður undir at byggja,
2) studningslánið verður tryggjað við veðrætti innan fyri 90% av metingarvirðinum,
3) viðtøkur eru fyri heimið, sum eru góðkendar av landsstýrismanninum, og sum einans kunnu broytast við samtykki hansara og
4) studningslánið fellur til gjaldingar, um so er, at ognin verður seld, ella ikki longur verður nýtt til ellis og røktarheim ella sambýli. Henda treyt skal tinglesast á ognini við servitutti.

Áðrenn studningslánið verður útgoldið, skal eitt pantibræv áljóðandi studningslánið, verða tinglisið á ognini.

Studningslánið verður útgoldið hvønn ársfjórðing, eftir at áteknað uppgerð yvir hildnar útreiðslur fyri ársfjórðingin frammanundan fyriliggur Almanna- og heilsumálaráðnum.

Vestmanna og Kvívíkar kommunur verður í hesum sambandi bidnar um at koma við uppskoti um útgjaldingarprofil fyri tíðarskeiðið, byggingin er mett at taka.

Eru serlig viðurskifti, ið gera seg galdandi, kann víkjast frá útgjaldingartíðarskeiðinum eftir nærri avtalu millum partarnar.

Grannskoðaður byggiroknskapur skal fyriliggja Almanna- og heilsumálamálaráðnum í seinasta lagi 6 mánaðir eftir, at byggingin er liðug.

Av tí at umsóknin um tal av búfólki ikki er gingin fult á møti, verður vísandi til § 18 í fyrisitingarlógini, givin kommununi møguleika at gera viðmerkingar til avgerð Almanna- og heilsumálaráðsins.

Biðið verður um at møguligar viðmerkingar eru Almanna- og heilsumálaráðnum í hendi í seinasta lagi 12. juni 2006.

Vinarliga

**Hans Pauli Strøm**
landsstýrismaður

Maria á Dul
virkandi aðalstjóri

# ALMANNA- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ

Tvøroyrar Kommuna
Postboks 20
810 Tvøroyri

**Tórshavn, tann** 24. mai 2006

**J.Nr.:** 0.35-2006000127/4
(at tilskila í svari)

**Viðgjørt:** RT/KÁ

**Viðvíkjandi umsókn um studningslán til bygging av eldrasambýli**

Tvøroyrar Kommuna hevur søkt um studningslán í sambandi við eina verkætlan um bygging av einum eldrasambýli til 24 búfólk.

Hervið verður sagt frá, at landsstýrismaðurin hevur avgjørt at geva Tvøroyrar Kommunu tilsøgn um studningslán á kr. 800.000,-. Tann endaliga játtanin av studningsláninum er treytað av, at niðanfyristandandi treytir verða uppfyltar:

1. Verkætlanin verður minkað úr 24 búplássum niður í 16 búpláss.
2. Verkætlanin er í tráð við kommunalu byggisamtyktina.
3. At Tvøroyrar Kommuna í seinasta lagi tann 1. oktober 2006 upplýsir fyri Almanna- og heilsumálaráðnum, hvussu kommunuparturin av íløguni í verkætlanina verður fíggjaður.
4. At Tvøroyrar Kommuna í seinasta lagi tann 1. oktober 2006 letur Almanna- og heilsumálaráðnum eina útgreinaða kostnaðarmeting av verkætlanini.
5. At í minsta lagi eitt umboð fyri Heimarøktina verður valt í bygginevndina.

Harumframt verður víst til treytirnar, sum eru ásettar eru í § 3, § 4, stk. 1 og § 6, stk. 1 og 2 í løgtingslóg nr. 166, frá 22. desember 2005 um studningslán til ellis- og røktarheim. Her verður m.a. ásett, at:

1) byggiætlan skal vera góðkend av landsstýrismanninum, áðrenn farið verður undir at byggja,
2) studningslánið verður tryggjað við veðrætti innan fyri 90% av metingarvirðinum,
3) viðtøkur eru fyri heimið, sum eru góðkendar av landsstýrismanninum, og sum einans kunnu broytast við samtykki hansara og
4) studningslánið fellur til gjaldingar, um so er, at ognin verður seld, ella ikki longur verður nýtt til ellis og røktarheim ella sambýli. Henda treyt skal tinglesast á ognini við servitutti.

Studningslánið verður útgoldið, tá byggingin er liðug og verður útgoldið eftir, at eitt pantibræv er tinglisið á ognina við áljóðandi studningsláni.

Grannskoðaður byggiroknskapur skal fyriliggja Almanna- og heilsumálamálaráðnum í seinasta lagi 6 mánaðir eftir, at byggingin er liðug.

Leggjast skal afturat, at tað í hesi tilsøgn um studningslán eisini liggur ein tilsøgn um, at landið veitir fígging til rakstur av nýggja eldrasambýlinum, eftir somu treytum sum til onnur eldrasambýli. Kommununar partur av hesi útreiðslu, er raksturin av bygninginum og gjald fyri náttavaktina.

Av tí at umsóknin um tal av búfólki ikki er gingin fult á møti, verður vísandi til § 18 í fyrisitingarlógini, givin kommununi møguleika at gera viðmerkingar til avgerð Almanna- og heilsumálaráðsins.

Biðið verður um at møguligar viðmerkingar eru Almanna- og heilsumálaráðnum í hendi í seinasta lagi 12. juni 2006.

Vinarliga

**Hans Pauli Strøm**
landsstýrismaður

/ Maria á Dul
Maria á Dul
virkandi aðalstjóri

Sørvágs kommuna
380 Sørvágur

**Tórshavn, tann** 24. mai 2006

**J.Nr.:** 0.35-2006000149/4
(at tilskila í svari)

**Viðgjørt:**

**Viðvíkjandi umsókn um studningslán til bygging av eldrasambýli**

Sørvágs Kommuna hevur søkt um studningslán í sambandi við eina verkætlan um bygging av einum eldrasambýli til 12 búfólk.

Hervið verður sagt frá, at landsstýrismaðurin hevur avgjørt at geva Sørvágs Kommunu tilsøgn um studningslán á kr. 500.000,-. Tann endaliga játtanin av studningsláninum er treytað av, at niðanfyristandandi treytir verða uppfyltar:

1. Verkætlanin verður minkað úr 12 búplássum niður í 10 búpláss.
2. Verkætlanin er í tráð við kommunalu byggisamtyktina.
3. At Sørvágs Kommuna í seinasta lagi tann 1. oktober 2006 upplýsir fyri Almanna- og heilsumálaráðnum, hvussu kommunuparturin av íløguni í verkætlanina verður fíggjaður.
4. At Sørvágs Kommuna í seinasta lagi tann 1. oktober 2006 letur Almanna- og heilsumálaráðnum eina útgreinaða kostnaðarmeting av verkætlanini.
5. At í minsta lagi eitt umboð fyri Heimarøktina verður valt í bygginevndina.

Harumframt verður víst til treytirnar, sum eru ásettar eru í § 3, § 4, stk. 1 og § 6, stk. 1 og 2 í løgtingslóg nr. 166, frá 22. desember 2005 um studningslán til ellis- og røktarheim og eldrasambýli. Her verður m.a. ásett, at:

1) byggiætlan skal vera góðkend av landsstýrismanninum, áðrenn farið verður undir at byggja,
2) studningslánið verður tryggjað við veðrætti innan fyri 90% av metingarvirðinum,
3) viðtøkur eru fyri heimið, sum eru góðkendar av landsstýrismanninum, og sum einans kunnu broytast við samtykki hansara og
4) studningslánið fellur til gjaldingar, um so er, at ognin verður seld, ella ikki longur verður nýtt til ellis og røktarheim ella sambýli. Henda treyt skal tinglesast á ognini við servitutti.

Studningslánið verður útgoldið, tá byggingin er liðug og verður útgoldið eftir, at eitt pantibræv er tinglisið á ognina við áljóðandi studningsláni.

EIRARGARÐUR 2 • 100 TÓRSHAVN
TELEFON 30 40 40 • TELEFAX 35 40 46 • E-MAIL: AHR@AHR.FO

Grannskoðaður byggiroknskapur skal fyriliggja Almanna- og heilsumálamálaráðnum í seinasta lagi 6 mánaðir eftir, at byggingin er liðug.

Leggjast skal afturat, at tað í hesi tilsøgn um studningslán eisini liggur ein tilsøgn um, at landið veitir fígging til rakstur av nýggja eldrasambýlinum, eftir somu treytum sum til onnur eldrasambýli. Kommununar partur av hesi útreiðslu, er raksturin av bygninginum og gjald fyri náttavaktina.

Av tí at umsóknin um tal av búfólki ikki er gingin fult á møti, verður vísandi til § 18 í fyrisitingarlógini, givin kommununi møguleika at gera viðmerkingar til avgerð Almanna- og heilsumálaráðsins.

Biðið verður um at møguligar viðmerkingar eru Almanna- og heilsumálaráðnum í hendi í seinasta lagi 12. juni 2006.

Vinarliga

Hans Pauli Strøm
landsstýrismaður

ALMANNA- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ

Vágs Kommuna
900 Vágur

Tórshavn, tann 24. mai 2006

J.Nr.: 0.35 – 200600139/44
(at tilskila í svari)

Viðgjørt:

**Viðvíkjandi umsókn um studningslán til bygging av røktarheimi í Vági**

Vágs, Porkeris, Hovs og Sumbiar kommunur hava søkt um studningslán til eina verkætlan um bygging av einum ellis- og røktarheimi í Vági til 32 búfólk.

Hervið verður sagt frá, at landsstýrismaðurin hevur avgjørt at játta í mesta lagi 12. mió. kr. til endamálið, við hesum treytum:

1. At verkætlanin er í tráð við kommunalu byggisamtyktina
2. At verkætlanin verður minkað úr 32 niður í 24 búfólk.
3. At øll ógreið viðurskifti viðvíkjandi grundstykkinum verða fingin uppá pláss
4. At í minsta lagi eitt umboð fyri Heimarøktina verður valt í bygginevndina.

Harumframt verður víst til treytirnar, sum eru ásettar eru í § 3, § 4, stk. 1 og § 6, stk. 1 og 2 í løgtingslóg nr. 166, frá 22. desember 2005 um studningslán til ellis- og røktarheim. Her verður m.a. ásett, at:

1) byggiætlan skal vera góðkend av landsstýrismanninum, áðrenn farið verður undir at byggja,
2) studningslánið verður tryggjað við veðrætti innan fyri 90% av metingarvirðinum,
3) viðtøkur eru fyri heimið, sum eru góðkendar av landsstýrismanninum, og sum einans kunnu broytast við samtykki hansara og
4) studningslánið fellur til gjaldingar, um so er, at ognin verður seld, ella ikki longur verður nýtt til ellis og røktarheim ella sambýli. Henda treyt skal tinglesast á ognini við servitutti.

Áðrenn studningslánið verður útgoldið, skal eitt pantibræv áljóðandi studningslánið, verða tinglisið á ognini.

Studningslánið verður útgoldið hvønn ársfjórðing, eftir at áteknað uppgerð yvir hildnar útreiðslur fyri ársfjórðingin frammanundan fyriliggur Almanna- og heilsumálaráðnum.

EIRARGARÐUR 2 • 100 TÓRSHAVN
TELEFON 30 40 40 • TELEFAX 35 40 46 • E-MAIL: AHR@AHR.FO

Kommunurnar verður í hesum sambandi bidnar um at koma við uppskoti um útgjaldingarprofil fyri tíðarskeiðið, byggingin er mett at taka.

Eru serlig viðurskifti, ið gera seg galdandi, kann víkjast frá útgjaldingartíðarskeiðinum eftir nærri avtalu millum partarnar.

Grannskoðaður byggiroknskapur skal fyriliggja Almanna- og heilsumálamálaráðnum í seinasta lagi 6 mánaðir eftir, at byggingin er liðug.

Av tí at umsóknin um tal av búfólki ikki er gingin fult á møti, verður vísandi til § 18 í fyrisitingarlógini, givin kommununi møguleika at gera viðmerkingar til avgerð Almanna- og heilsumálaráðsins.

Biðið verður um at møguligar viðmerkingar eru Almanna- og heilsumálaráðnum í hendi í seinasta lagi 12. juni 2006.

Vinarliga



**Hans Pauli Strøm**
landsstýrismaður